# Minka um CO2 útlátið

**Hóskvøldið klokkan 19.30 verður Norðurlandahúsið karmur um tiltak um orkusparing. - Lær hvussu tú sparir upp í 35 prosent, siga fyriskiparanir**

ORKUSPARING
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*




-Kom niðan í Norðurlandahúsið og fá góð ráð um, hvussu tú kanst minka um CO2 útlátið í tínum dagligu gerðum og samstundis spara pening. Soleiðis siga fyriskipararnir av umhvørvistiltaki, sum verður í Norðurlandahúsinum hósdagin klokkan 19.30.

Tað verður lívstílsserfrøðingurin Christine Feldthaus, sum vit eisini kenna frá DR1 sendingini Kender du typen, sum við sínum eyðkenda og lætta lyndi fer at greiða frá, hvussu hon hevur minka um CO2 útlátið við 35 prosentum.

Eisini verður ein umhvørvisstuttfilmur sýndur, sum tekur støði í gerandisdegnum hjá tveimum føroyingum. Tað er filmsverkstovan Klippfisk, sum hevur framleitt filmin.

Harafturat hevur SEV eina framsýning, sum lýsir el nýtsluna í dagligdegnum, umframt at tilfar um orkusparing frá kappingini millum 7. flokkar verður víst fram.

Landstýriskvinnan við umhvørvismálum Annika Olsen leggur út við at bjóða vælkomin.

Tað eru Umhvørvisstovan, Tórshavnar kommuna, SEV og Agenda 21 stovan, sum saman skipa fyri tiltakinum.




## Teldufólk

**Alpha Travel søkir eftir einum teldufólki til skrivstovuna í Tórshavn, at byrja skjótast tilber.**

Alpha Travel er ein vinnulig ferðaskrivstova, ið avgreiðir ferðir fyri virkir, stovnar og reiðarí. Felagið hevur skrivstovu í Tórshavn og í Bukarest í Rumenia. Nú virksemið verður víðkað, sóknast vit eftir einum teldufólki, til at umsita og røkja teldubúnaðin hjá felagnum.

**Arbeiði umfatar umsiting og røkt av:**
- Servarum hjá Alpha Travel og Fonn Flog
- Terminalservara
- Teldupostskipanini
- Hardware og software annars

**Persónligir førleikar:**
Vit vænta, at tú hevur góðan teldukunnleik umframt viðkomandi útbúgvin ella royndir. Tú ert smílandi, ágrýtin, fyrikomandi og lættur/løtt av lyndi.

**Hjá Alpha Travel fært tú:**
Eitt spennandi arbeiðspláss við nýggjum avbjóðingum hvønn dag, har vit hava høgar ambitiónir um altíð at gevu bestu tænastu og har sjálvstøða og nýhugsan verða høgt mett. Eitt gott arbeiðsumhvørvi í stórum og ljósum hølum.

Løn og treytir sambært avtalu og førleika.

Hevur hetta tín áhuga, ert tú vælkomin at senda eina umsókn og C.V. sum teldupost til: tommy@alphatravel.fo

ella við vanligum posti til:

Alpha Travel,
Eystara Bryggja,
100 Tórshavn
viðmerkt: Umsókn

- í seinasta lagi 31. august 2009.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

ALPHA BUSINESS TRAVEL

Eystara Bryggja • FO-100 Tórshavn • Faroe Islands
Tel.: +298 35 29 00 • Fax +298 35 29 01 • E-mail: alpha@alphatravel.fo



VÁGA KOMMUNA

## ÚTBJÓÐING

Í samband við bygging av nýggjum barnaansingarstovni í Miðvági verður:

**INNILOKAN AV BYGNINGINUM**

hervið boðið út í almenna lisitatión samsvarandi galdandi reglum.

Arbeiðið snýr seg í høvuðsheitum um áleggingav tekju, ísetan av vindeygum og hurðum umframt klæðing av bygninginum.

Útbjóðingartilfarið fæst frá skrivstovuni hjá Vága kommunu í Sandavági, Hammershaimbsvegur 1, 360 Sandavágur, móti at flyta kr. 5.000,- á konto í Føroya Banka nr. 6460 – 220.055.6

Tilboð í aftulatnum brævbjálva merkt- ur »Barnaansingarstovnur í Miðvági: Innilokan«, skulu vera skrivstovuni hjá Vága kommunu í Miðvági, Jatnavegur 2, 370 Miðvágur, í hendi seinast mikudagin hin 16. september 2009 kl 1300.

Lisitatiónin verður sama dag kl. 13.15, har teir bjóðandi hava møguleika fyri at verða hjástaddir.

Vága kommuna tilskilar sær rætt til at velja ímillum innkomin tilboð ella ongum at taka av.

Lýsing av bygninginum kann síggjast á: www.wt.fo /verkætlanir

VÁGA KOMMUNA
Hammershaimbsvegur 1 · 360 Sandavágur · Tlf. 344400 · Fax 333470 · vaga@vaga.fo